## VIÐMERKINGAR

# AMOR og tað kroniskt forlipta skaldið

Við tað, at fagnaðarárið fyri tvinnar øldir hjá H.C.Andersen av álvara er farið at halla, havi eg týtt eina av hansara ultrastuttu smásøgum, sum fyrstu ferð varð prentað í 1835. Hetta var um tað mundið, tá ið hann var ólukkuliga forliptur í tí hábærsligu bourgeoisi-kvinnuni, *Louisu Collin*.

Søgustubbin sigst vera inspireraður av eini yrking úr *Antikkini* eftir greska skaldið, *Anakreon*.

Fyri óvitar er henda "naiva" søga, har fólk verða skotin, og ein vaksin skeinkir vín fyri einum barni, dramatisk og ómoralsk, harafturat gátuført og óhugnalig, men fyri vaksin er hon ambivalent ironi, og avgjørt ikki bara meinaleys og naiv poesi. Tað stendur til hvønn einstakan, hvat hann fær burturúr *H.C.Andersen*, men tað eru nógv ymisk niveau í hesi lítillætnu og tó fjølbroyttu søgu

**Virgar T. Dalsgaard týddi (december 2005)**



**TANN ILLAVORÐNI DRONGURIN**

**eftir H. C. Andersen**

Einaferð var tað ein gamal yrkjari, ein sovorðin rætti-ligur fittur gamal yrkjari. Eitt kvøldið, hann sat einsamallur heima, brast eitt ræðuligt ódnarveður á uttanfyri húsini; regnið oysti niður; men tað gamla skaldið sat fjálgt og væl við ovnin, har eldurin brimaði og súreplini snurraðu.

„*Tað verður ikki ein tráð-ur turrur uppi á teimum neyðardýrum, sum eru úti í hesum veðrinum!*“ helt hann fyri, tí hann var ein sovorðin fittur yrkjari.

„*Áh, lat mær upp! Eg eri kaldur og eisini vátur!*” rópti eitt lítið dreingjabarn uttanfyri. Tað græt og bankaði uppá hurðina, meðan regnið glumdi niður, og vindurin skrykti í vindeyguni.

"*Áh, títt ólukkudýr!*” segði tað gamla skaldið, og fór yvir at lata hurðina upp. Har stóð ein lítil drongur; hann var heilt nakin, og vatnið rann úr tí langa, gula hárinum. Hann skalv av kulda; - hevði hann ikki sloppið inn, hevði hann helst doyð úti í tí herviliga veðrinum.

"*Nú, stakkalur!*” segði tann gamli yrkjarin og tók í hondina á dronginum. "*Kom tú inn til mín, so skal eg verma teg! Vín og eitt súrepli skalt tú fáa, tí tú ert ein fittur drongur!*”

Tað var hann eisini. Eyg-uni vóru sum tvær bjartar stjørnur, og hóast vatnið streymaði oman eftir tí gula hárinum, purlaði tað fagurliga um høvdið. Hann sá út sum eitt lítið einglabarn, men var bleikur av kulda og skalv um allan kroppin. Í aðrari hondini hevði hann ein snotiligan ørvarboga, men bogin var illa farin av regninum; allir teir føgru litirnir á teimum vøkru píl-unum vóru flotnaðir saman í vátveðrinum.

Tað gamla skaldið hoykti seg niður við ovnin, setti seg undir tann lítla piltin, vant burturúr tí rennváta hárinum, vermdi hendurnar í sínum egnu og kókaði honum søtt vín; - so kom drongurin aftur fyri seg, fekk roða í kjálkarnar, sprakk niður á gólvið og dansaði rundan um tann gamla yrkjaran.

"*Tú ert ein kátur drongur!*“ segði tann gamli. „ *Hvussu eitur tú?*“

„*Eg eiti Amor!*“ svaraði hann, „*kennir tú meg ikki? Har liggur mín ørvarbogi! Honum skjóti eg við, kanst tú ætla! Hygg, nú verður veðrið betri uttanfyri; mánin skínur!*”

"*Men bogin hjá tær er í óstandi!*” segði tann gamli yrkjarin.

"*Tað var illa!*” segði tann lítli drongurin, tók bogan upp og hugdi at honum.

"*Áh, hann er longu turrur og aftur í góðum standi! Strongurin situr heilt stinn-ur! Nú fari eg at royna hann!*”

So spenti hann bogan, legði ein píl á, siktaði og skeyt tað fitta gamla skaldið beint í hjartað: "*Sært tú nú, at ørvarbogi mín ikki var í óstandi!*” segði hann, flenti heilt hart og slapp sær avstað.

Tann ljóti drongur! Soleiðis at skjóta eftir tí gamla yrkjaranum, sum hevði sloppið honum inn í ta heitu stovuna, verið so góður við hann og givið honum tað leskiliga vínið og tað besta súreplið.

Tann fitti yrkjarin lá á gólvinum og græt; hann var raktur djúpt í hjartað, og so segði hann: "*Fý, sum Amor er ein illavorðin drongur! Hatta fari eg at fortelja øllum góðum børnum, so tey kunnu ansa sær, og ongantíð spæla við hann, tí hann ger illa fortreð!*“

Hann fortaldi tað fyri nógvum góðum børnum, bæði gentum og dreingjum, og tey royndu øll at ansa so væl eftir tí ljóta Amori, men hann lumpaði tey kortini, tí hann er so snildur!

Tá ið studentarnir fara frá fyrilestrum, rennur hann við síðuna av teimum. Hann er í svørtum kjóla og hevur eina bók undir arminum. Teir kenna hann als ikki, taka undir armin á honum og halda hann eisini vera student; men so stingur hann ørvin beint í bringuna á teimum.

Tá ið genturnar koma frá presti, og tá ið tær standa á kirkjugólvinum, so er hann eisini eftir teimum. Ja, hann er alsamt eftir fólki! Hann situr í tí stóru ljósakrúnuni í *Kongiliga Sjónleikarhúsinum*, har stendur hann í ljósum loga, so fólk halda, at hann er ein lampa; men seinni fáa tey annað at merkja. Hann rennur í *Kongsins hava* og á bønum á verjubrekkunum rundan um býin! Ja, hann hevur einaferð skotið pápa tín og mammu tína beint í hjartað! Spyr tey, so skalt tú bara hoyra, hvat tey siga.

Ja, hatta er ein óargaligur drongur, hasin Amor, tú mást ongantíð koma tær í hóslag við hann! Hann er eftir øllum fólki! Hugsa tær: Hann skeyt eisini ein píl sjálvt eftir gomlu ommu, men tað er langt síðani; - tað hevur javnað seg; men sovorðið gloymir hon ongantíð. Tí vorði, tann forherðaða Amor! Men nú kennir tú hann! Veitst, hvussu illavorðin drongur, hann er!

# Takk Tórshavnar Býráð!

**Malan Johannesen,**
*Villingadalsvegur í Havn*

Eg fari vegna okkum, sum hava gramt okkum um landsvegin, sum ætlanin er at leggja at kalla í túnið hjá fleiri okkara, at takka Tórshavnar Býráð fyri, at tað tekur atlit til umhvørvið og trivnaðin hjá havnaborgarum.

Harumframt halda vit, at tað er skilagott at umhugsa hesa gomlu ætlan av nýggjum, tí ferðslumynstrið um alt landið er so nógv broytt hesi árini, síðan ætlanin varð gjørd.

Gleðilig jól og alt tað besta í 2006 ynskja vit øll-um tykkum sum manna Býráðið!

# Vanlukkutrygging av skúlanæmingum

**TÍÐINDASKRIV**
*Kommunusamskipan Føroya*

Landsstýrismaðurin í mentamálum svaraði mikudagin 14. desember munnligum fyrispurningi í Tinginum frá Bill Just-inussen, løgtingsmanni, um vanlukkutrygging av skúlanæmingum.

Landsstýrismaðurin róði í svarinum fram undir, at kommunurnar hava ábyrgdina av at tryggja skúla-næmingar móti vanlukkum í skúlatíðini. Kommunu-samskipan Føroya (KSF) metir tað vera neyðugt at gera nakrar viðmerkingar og rættingar til svarið.

Sambært fólkaskúlalógini hevur kommunustýrið ábyrgd av, at øll børn í kommununi hava møguleika at fáa lógarásettu undirvísingina í fólkaskúlanum, og at hóskandi undirvísingarhøli og skúlabygningar eru til taks. Tí hava kommunurnar eisini ábyrgd av skaðum á næmingar í fólkaskúlanum, um hesir koma av, at bygn-ingar og fysiskir karmar ann-ars ikki eru tryggir. Undir ongum umstøðum ber tó til at gera ta niðurstøðu, sum landsstýrismaðurin ger í svarinum, at kommunurnar hava ábyrgdina av at tryggja næmingarnar móti vanlukkum í skúlatíðini.

Kommunurnar hava ikki ábyrgdina av øðrum enn nevndu skaðum, ið næm-ingunum kann verða fyri í skúlatíðini. Tá eru tað antin næmingarnir sjálvir, sum hava ábyrgd, ella Mentamálaráðið. Menta-málaráðið er arbeiðsgevari hjá lærarunum, og hevur tí ábyrgdina, tá skaðin kemur av, at lærarar ikki hava røkt sína umsjónarskyldu við næmingunum nóg væl. Hetta fylgir av vanligu grundreglunum um arbeiðs-gevaraábyrgd.

Fram til 1. august 2004 høvdu land og kommunur felags vanlukkutrygging fyri skúlanæmingar, ið Mentamálaráðið stóð fyri. Henda felags trygging varð uppsøgd til 1. august 2004, tí at Mentamálaráðið upplýsti, at landsgrannskoðarin hevði boðað frá, at landið ikki hevði heimild til at standa fyri vanlukkutrygging av næmingunum. Tá valdi onkur kommuna at tekna vanlukkutrygging fyri sínar skúlanæmingar sjálv.

At onkrar kommunur hava valt at vanlukkutryggja sínar fólkaskúlanæmingar kann ikki skiljast so, at slík skipan nú er vorðin ein kommunal skylda. Kommunurnar hava sum nevnt einans skyldu til at veita endurgjald fyri skaðar, ið hava samband við sjálvar skúlabygningarnar og fysisku karmarnar annars. Henda rættarstøða broytist ikki av, at onkrar kommunur áður hava havt eina meira víttgangandi siðvenju.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við